SOSIALURIN

Nr. 15 — 23. FEBRUAR 1963 — 36. ÁRG.

Í DAG

FÍGGJARÆTLAN SVENSKA VÆLFERÐASTATSINS.

21.755.000.000 kr. á fíggjarætlanini

AFTANÁ umleið 30 ára stjórnarfyrisæti javnaðarmanana man hin svenski vælferðarstaturin vera hin fremsti í heiminum — har er vælferð á øllum økjum. Uppskot um fíggjarlóg fyri komandi ár er løgd fyri tingið. Vit skulu her endurtaka útreiðslutølini, sum skulu lesast í miljónum krónum:

1. Her- og sivilvernd	4.025
2. Fólkapensjónir	3.110
3. Skúlaskapur, gransking, mentan	2.990
4. Vegir og samferðsla v. m.	2.600
5. Sjúkrahús og heilsutiltøk	1.370
6. Bústaðir	1.205
7. Barnastuðul	945
8. Rentur av statsskuld	820
9. Ravmagn o. o. driftsmegi	630
10. Arbeiðsloysisstuðul og arbeiði	595
11. Løgreglumál	375
12. Landbrúksstuðul	360
13. Ymiskar útreiðslur	2.730
Í alt	21.755

Vælferðarpolitikkur javnaðarstjórnarinnar eigur fólksins dygga stuðul: 116 av 230 tingmonnum, 52 pst. av býarstýrinum í Stockholm o. s. fr.

Kvinnan

RUSTFRITT STÁL

kann rusta, tá tað í, d. fer illa av sterkum saltlaka. Goym tí ikki saltvørur í íløtum av rustfríum stáli. Rustfritt stál tolir ikki at saltsýra kemur at tí, tílík íløt eiga tí at verða reinsað við eddika sýru ella salpetursýru.

Silvurknívar við rustfríum stálbløðum mugu ongatíð reinsast við sodalúti ella reinsievnum úr handlánum, har ein einans skal drepa lutirnar niður í.

—o—

MARGARIN OG KJØT. Tá ið tú skalt lata upp ein margarinpakka ella ein pakka við kjøtfars, og tú ikki vilt hava nakað at hanga eftir uppi á pappírinum at halda pakkan undir rennandi, køldum vatni eina løtu. Gert tú hetta, kanst tú opna pakkan uttan at noyðst at skava ein part av innihaldinum burtur aftaná.

—o—

LEYLUKTUR á hondunum fæst best burtur við at skola hendurnar í køldum vatni. Nýt ongatíð heitt vatn; tað ger bara verri.

ÚTVARPIÐ

PRÆDIKUMAÐURIN ... OG ÚTVARPIÐ

TAÐ er sjálvandi mest hitt kristiligа hansara áhugа stendur til, og um viðurskiftini nú sigur hann:

— Tiltøkini við gudstænastum og eisini kristiligum songi eru frálík; men vit hava ov lítið av hesum í mun til alt annað, ið sent verður, serstakliga hin óvandaliga tónleikin.

— Og framtíðarynskini?

— Eitt kristiligt samkomukvøld aftrat um vikuna, og síðani meira av kristiligum songi og tónleiki. Her trýtur ikki tilfar at taka av, tí einki ger, um vit leita okkum tilfar frá øðrum — umráðandi er at tað er kristiligt og til sálarliga uppbyggjan.

Sygjað

18. OKTBR. 1962 skrivar ein burt ur hini miklu huldumannafjøldini í »Tingakrossi« m. a.

»Eg sigi: varið tykkum. Hin ódálkaði og reini Sjálvstýrismaðurin er at finna í »Tingakrossi«. Nú er alt rusk burtur « SIÐAN tá eg fari hitt seinasta, lítla ruskið:

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN!

Bókur-blað

»NORDISK REVY.« Í »Kristeligt Dagblad« hevur blaðstjórin Boheman uppskot um eitt norðurlendskt tíðarrit, og heldur hann, at hetta eigur at koma í staðin fyri hitt keðiliga blaðið hjá felagnum »Norden.«

Hann roknar við nógvum túsind haldarum í Danmark og uppaftur fleiri í Noreg og Svøriki tilsamans. Heldur ikki ivast hann í, at blaðið verður at vinna stórpening við lýsingum, ið tá fáa framúr góð líkindi at fara um landamørkini. Hann mælir til, at blaðið verður nevnt »Nordisk revy.«

Brævkassin

»Brævkassin«

Tá ein hevur eitt barn í einum barnagarði, er tað loyvt viðkomandi at draga kostnaðin av hesum frá í sjálvuppgávuni til skattalikningina?

Faðir.

SVAR: Nei. Ein hevur ikki rætt til frádrátt av útreiðslum í sambandi við at hava børnini í barnagarði.

Leiklist

19 MILJ. KR. HALL

TAÐ er ikki smápeningur, leiklistini tørvar, um hitt besta skal fáast burtur úr. Hallið hjá »Det kgl. Teater« er fyri fíggjarárið 1963—64 mett til 19 milj. kr., ið ríkiskassin verður at gjalda.

Eisini í øðrum londum letur ríkiskassin stórpening til leiklistina. Í fjør lat svenski ríkiskassin 13,3 milj. kr. (til beinleiðis hall). Í Sveits lat ríkiskassin umleið 50 milj. kr. til 5 statsteatur og 28 milj. kr. til statsoperaina.

Útróttin

DÓMARAPRÓGV. Bretar gera almikið fyri at fáa tað besta burtur úr teirra fótbóltsspæli. Eitt nýtt tiltak er: prógv til fótbóltdomarar. Bretska fótbóltsligain hevur í brævi til 92 fótbóltfeløg boðað frá, at hon er sinnað at fara til verka fyri at fáa meira og betri úrslit burtur úr dómarastættinum.

Aftaná hvønn dyst skulu bæði liðini lata dómaran fáa hóskandi stig (point) fyri tað arbeiðið, hann hevur avrikað undir dystinum. Tá ið fótbóltsárið er av verða stigini samantald, og um ein dómari hevur færri stig enn avmarkað er, verður hann settur frá sum dómari.

Veitst tú?

AT tað eru øgliga vatnmongdir, ið nógvar av teimum stóru áunum flyta við sær til havs hvørja løtu av samdøgrinum — ár undan ári, og at nógvir av hesum áarmunnum eru stórir flógvar.

AT tiggju av teimum áunum, ið flyta størstu vatnmongdirnar eru hesar og renna í nevnðu londum ella heimsportum. (Vatnmongdirnar eru máldar í **kubikkmetrum** pr. **sekund.**):

AMAZON, Suðurameriku	**120.000**
GANGES, Indiu	**39.000**
KONGO, Afrika	**39.000**
NIGER, Afrika	**25.000**
PARANA, Suðuramerika	**25.000**
YANGTZEKIANG, Kina	**22.000**
VOLGA, Sovjet	**18.130**
MISSISIPPI, USA	**17.500**
MEKONG, Bakindiu	**12.000**
ST. LAWRENCE, N.-Amer.	**10.000**

Mangt

RAKIMASKINAN. Teir, ið gera el-rakimaskinurnar siga, at neyðugt er at geva hesum tólum bestu rokt og leggja serligan dent á:

1. Rakimaskinan skal tomast einaferð dagliga; skeggstubbar í maskinuni gera, at hon rakar bæði ringari og seinri.

2. Einaferð um vikuna skal tað ovasta av maskinrakiknívarnir — leggjast í spritt fyri at reinsa burtur fitievni av húðini.

3. Einaferð um árið skal maskin an sendast til eftirkanningar, smyrjing og justeringar.

—o—

TROPU-FISKUR. Á altjóðafundi hevur russiski vísindamaðurin Bogorov sagt, at í verðinshøvunum er hópur av ríkidømi at vinna manna ættini til matna og legði hann aftrat, at fiskivinnan í teimum heitu høvunum lættliga fleirfaldast um nøkur ár.

Í Indiu hava teir ikki færri enn 400 MILJ. heilagar kýr. Serfrøðingar siga, at um teir drupu 200 milj. av hesum kúnum, kundi India fyrafaldað mjólkaframleiðsluna av tí nógva fóðrinum, sum nú veruliga onga nyttu ger.

—o—

LANGT BORÐ. Settu vit allar heimsins ibúgvar hvør síni megin borð, vildi hetta borðið rokki 23 ferðir kring jørðina, men fyri at rúmað teimum nýfoddu vildi verið neyðugt at longt borðið 35 km hvønn dag. Ár 2000 verður borðið at røkka 47 kring um jarðaknøttin.

—o—

USA hevur í dag heimsins størsta handilsflota. Í Norðanlondum er Noreg langt á odda. Handilsflotarnir eru hesir:

1. USA 2637 skip 21.056.000 t.
2 .Bretl. 2897 skip 20.626.000 t:
3. Noreg 1610 skip 12437.000 t.
Liberia er n. 4, Japan 5, Grikkaland 6, Italia 7, Holland 8, Vesturtýskland, 9 Frankariki 10, Sovjet 11,
12. Svoriki 799 skip 4.135.000 t.
Panama er nr. 13 og
14. Danmark 508 skip 2.231.000 t.

—o—

HVAT MERKIR ORÐIÐ JÓL?

Annaðhvørt hevur tað samband við hjól ella sólina ella eisini herróp víkingina. Víkingarnir, sum um ár 950 vóru í hertænastu grikska keisarans, hildu til fræga keisarans jól við miklum slagsmáli millum livgardu og herflota. Kamp rópið, teir nýttu, var »jól.«

—o—

BOKSING. Í 1962 vóru 14 boksarar slignir til deyðis, meðan ein hevur ligið vitleysur nú í meira enn 100 dagar. Í 1961 doyðu 9 boksarar, 1960 doyðu 10 og 1959 doyðu 9.

—o—

100.000 RÝMDU. Av ótta fyri at Bretland kom uppí felagsmarknaðin og óttin fyri arbeðsloysi gjørdi, at 100.000 fólk rýmdu úr Bretlandi í fjør. 3 av 4 fóru til Australiu, 15.000 til Kanada og 12.000 til New Zealand.

—o—

TWIST-MILJÓNERUR. Uppfinnarin av twist-dansinum, 22 ára gamli amerikanari Ernest Evans hevði á 21 ára føðingardegi sínum vunnið umleið 56 milj. kr.

—o—

»JOURNAL DE GENEVE«, sveits iskt blað, skrívar:

»Tað er einki loyndarmál, at Kennedy, forseti, altíð hevur hildið nógv av de Gaulle — og at de Gaulle heldur nógv av frú Kennedy.

—o—

VÆL SAGT. Tað eru tey, ið eru av teirri áskoðan, at kvinnan eigur at vera viðfarin, eins og var hon ein sjálvhugsandi vera.

—o—

UM JÓLABLOÐ: Søgurnar í jólabløðunum eru ofta so innhaldsleysar og langrøkitar, at tað tekur alt ov langa tíð at leypa nóg mikið um, tá ein lesur tær.

—o—

VIÐ lóg skal land byggjast. Und ir fólkaflokks-sambandslandsstýrinum viðtóku teir lóg um at steðga allari havna- og vegagerð.

—o—

NORSKA ÚTVARPIÐ: Við grunn af knap tid kan vi desværre ikke spille Schuberts »Den ufuldtendte« i sin helhed.

—o—

EINGIN tolir so væl brennivín sum ein fløka.

—o—

MINNIST TIL:

AT LESA SOSIALIN!
AT HALDA SOSIALIN!
AT KEYPA SOSIALIN!

BARNAMATUR

SET SAMAN. Niðanfyri eru nevnd 10 blómur og urtir; men vit hava tægað nøvnini sundur. Nú ræður bert um at seta rætt samanaftur:

EI — LIA — BAL — JÓ — FJAL — DI — AN — SKÚ — GRAS — MÝ — LA — VA — HØM — BØN — FJAL — HA — GRAS — RU — SØ — PA — SMÆ — LA — GA — DURS — GRAS — RA — KU — SØL — BRÚÐ — BRÁ — BØR — UR — KU — JA — RIS — FÍ.

—o—

HVØR landsmaður var Kolumbus? **Spaniari - Portugisari - Italienari.**

—o—

ÚR hvørjum sangi er henda reglan tikin:

...sum standa verjur um fosturjørð.

til gamans

BRIDGE. Tað sita fýra kvinnur um borðið og spæla bridge; men ferð eftir ferð kemur steðgur í, tá tær hava so nógv at práta um. At enda illskast Jóhanna og heldur fyri:

— Nú mást tú hugsa meira um kortini, Elsa — vit tosaðu um skilsmissuna hjá Katrinu og ikki um hin nýggja hattin hjá Petrinu

—o—

Í KRAMBÚÐINI. Hon var í kram búðini og royndi einar nýggjar skógvar, gjørdir úr krokodilluskinni.

HON: Eru teir vatntættir?

Keypm.: Ja, sjálvandi, annars vildu krokodillurnar drukna.

—o—

EIN skal ongatíð siga einari kvinnu ímóti, tí bara hon sleppur at práta tveir minuttir aftrat, ger hon tað sjálv.

Eitt

sovikamar-møbliment

mahogny,

dupultsong við skápum og øðrum, ein einkult mahognysong við madrassu og ein jarnsong við madrassu til sølu.

Telefon 21, Tvøroyri.

2802

SNAR-*vaskað*

centrifugerað og turkað

SNAR-*vask*

Bøgøta 14

HESS-O-DAN

Danmarks bedste oliekamin. Automatisk rundtræk og trækregulering.

Pf. VALDEMAR LÜTZEN
Tórshavn